# Margblømdur rølikur *Achillea millefolium*





***Maturt:***
Hevur verið nýtt til te.





***Grøðiurt:***
Hevur verið nýtt til at reinsa sár við.

# Stórvaksin gøtubrá *Plantago major*





***Grøðiurt:***
Hevur verið nýtt til at reinsa og lekja sár við.

# **Aksmynta** *Mentha spicata*

Fólk hava havt plantuna við sær til Norðurlond í miðøld ella fyrr.





***Maturt:***
Hevur verið nýtt til te og sum kryddurt.

***Grøðiurt:***
Er góð fyri sodningina.

# **Tásársgeitarkál** *Aegopodium podagraria*

Hugsandi hava fólk tikið plantuna við sær til Norðurlond í fornari tíð.



***Maturt:***
Kann nýtast til salat. Kann eisini gerast til á sama hátt sum spinat.



# **Vanlig reinfann** *Tanacetum vulgare*





***Grøðiurt:***
Hevur verið nýtt fyri magapínu, gikt, fótagikt o.a. Plantan er eitt sindur eitrandi. Hon hevur eisini verið nýtt fyri orm í innvølum.



# **Tvíbýlisnota** *Urtica dioica*



***Maturt:***
Kann nýtast til salat; kann eisini gerast til á sama hátt sum spinat ella nýtast til súpanarbót.

***Grøðiurt:***
Hevur verið nýtt fyri nógv ymiskt.



# **Søtur urtakervil** *Myrrhis odorata*

Munkar hava tikið plantuna við sær til Norðurlond í miðøld.



***Maturt:***
Kann nýtast til salat og til súpan.

***Grøðiurt:***
Hevur verið nýtt sum grøðiurt.



# **Leggsýra** *Rumex acetosa*



***Maturt:***
Var ein av teimum fyrstu plantunum, sum varð nýtt sum salat og sum kryddurt.

***Grøðiurt:***
Var nýtt fyri skyrbjóg.

# **Atamjaðarurt** *Filipendula ulmaria*



***Grøðiurt:***
Hevur verið nýtt at lekja sár við og at lætta um høvuðpínu.
Plantan hevur verið kókað, og soðið drukkið fyri høvuðpínu.







# Heima- ella bjargahvonn

*Angelica archangelica*

Hvonn var søluvøra longu um ár 1.000. Munkar tóku plantuna við sær suðureftir.





***Maturt:***
Bæði rót og stelkur hava verið etin rá. Hvonn kann súltast, og bomm kunnu gerast úr hvonn.



***Grøðiurt:***
Hevur fyrr verið nýtt sum grøðiurt.

# **Várhagasólja** *Taraxacum sect. Ruderalia*

Munkar hava tikið plantuna við sær úr Fraklandi til Norðurlond tíðliga í miðøld.



***Maturt:***
Hevur verið nýtt til salat.



***Grøðiurt:***
Hevur fyrr verið nýtt sum grøðiurt.



# **Kubbut hømilia** *Rumex obtusifolius*



**_Maturt:_**
Hevur í miðøld verið nýtt til salat og sum kryddurt.

**_Grøðiurt:_**
Hevur verið nýtt fyri pínu og fyri magan.